# Dagbókabrot úr eini hospitalssong á B6



*Døgurðin er, saman við stovugongdini, absolutt hæddarpunktið á degnum á B6. Onkuntíð fella hesar týdningarmiklu hendingar saman, og tá má døgurðin víkja og gerst kaldur, men tað er ikki ofta. Tú kann mála tína heilsustøðu út frá hvussu feitur ella rak døgurðin er ella hvussu nógv er á tallerkinum. Er tú ikki alt ov sjúkur og er tú positivur á lyndi, so er tað tað reinasta luksus at liggja á sjúkrahúsi í Føroyum. Maturin er framúr góður og tú fær nóg mikið av øllum, og omaná tað heila so sleppur tú at sova aftan á døgurða. Tann, sum ikki rósar blíðskapinum á B6 og tí menniskjaligu viðferð sjúklingarnir fáa, rósar heldur ikki øðrum í lívinum, uttanfyri sjúkrahúsið. Hann er stutt sagt ikki annað enn eitt grenj at rokna, føddur í moll og har broytist einki. Hann kann heldur ikki gera við tí, hann er bara føddur soleiðis. Lat okkum skilja hann, heldur enn at verða skilt sjálvi. At so onkur lækni tekur onkra skeiva avgerð við hvørt, well, hvør ger ikki tað?*

*Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Seinni partur**

**Týsdagur 15. januar 2002:**
Heilsan er alt verður sagt, og hesin setningur fær fyrst meining, tá tú missir hana. Á einum sjúkrahúsi er heilsa tað einasta, vit ikki hava nóg mikið av. Og á einum sjúkrahúsi fær tú óendaliga nógv at vita um teg sjálvan, og hvussu stór tín ábyrgd er fyri góðum lívi ella einum betri lívi, enn um tú bara letur standa til.

Í dag havi eg so kent ábyrgd fyri míni heilsu og havi gingið heilt niðan til Hoyvíkar, heim til hús. 50 minuttir tók tað. Eg visti slett ikki, at tað var so hugnaligt at ganga. Havi bara sitið í bili seinastu árini. Havi sæð Havnina gjøgnum forrútin á bilinum, har myndabrotini eru klipt av viskaranum, sum vanliga hevur vaggað aftur og fram.

Fyrst gekk eg heim á Skálatrøð, har hitti eg ein vinmann, sum í tí dagliga er heilsølumaður, hann var hendan dagin og hugdi eftir bátinum, ið lá snøggur og betaltur við flótibrúgvarnar. Síðan niðan á Konditaríið, men har kendi eg ongan uttan sjálvsagt tær fittu tíðarleysu servitrisurnar. Leiðin gekk niðan í SMS. Tunnligt við fólki. Fór skjótt útaftur og helt leiðina niðan í Hoyvíkshagan. Vakurt er í Hoydølum. Eg gekk eftir nýggju gøtuni omanfyri Skógrøktina og niðan fyri Svartafoss tvørtum um dalin. Síðan eftir gøtuni aftan á Mannbrekku, á Mýruna og niðan á.

Deyðin hevur vitjað tvær reisur á hospitalinum seinastu dagarnar og í dag fór ein á okkaru deild. Eg kendi ikki mannin, men kendi tey avvarðandi, sum sótu óttafull úti á gongini, meðan tann deyðsmerkti stríddist. Hann doyði, meðan eg gekk úti í Guds fríðu náttúru og undraðist. Her kennist so friðaligt og tómt í kvøld, nú eg eri afturkomin. Kaldi óbodni gesturin hevur vitjað. Starvsfólk tosa lágmæltari, sjúklingar teska og øll ynskja deyðan har piparið grør ella longur.

Omanfyri okkum bleiktra stjørnurnar. Aftanfyri tær verður tikið ímóti og boðið til stórt gildi fyri teimum, sum júst eru heimkomin av landssjúkrahúsinum, nú teirra jarðarferð er endað í tíð og rúmd. Orionsbelti stendur upp á ská beint yvir Kirkjubøreyni, á veg niður í vestri, og Sirius bleiktrar bláhvít og køld niðanfyri vinstrumegin, norðanvert við nýggja býlingin á Hamrinum á Argjum, úr vindeyganum her eg siti. Her er friður á B6 í nátt og aldurnar á sandinum í Sandágerði telja veika puls havsins, nú frostið kínir landinum í kvirru.

**Mikudagur 16. januar 2002:**
Her er hent lítið í dag, gekk ein langan túr og heilsan er munandi batnað. Eyguni eru troytt og duga ikki at síggja meira og tey orka heldur ikki at evna, tað tey hava sæð í dag til fittar orðamyndir, sum høgra hond skuldi skriva niður á hvíta linieraða pappírið í dagbókini í kvøld. Á koddanum liggur skaldsøgan “Bliktrommen” eftir týska rithøvundanum, nobelvinnaranum Günter Grass og bíðar, og dugi eg ikki at skriva, so dugir Günter bæði væl og virðiliga.

**Hósdagur 17. januar 2002:**
Í dag søgdu vit einum farvæl her á sjúkrahúsinum. Einum vinmanni hjá mær. Vit hava alt soleiðis hjá okkum, og tað var ikki so stórt hóvasták, at sýna honum seinasta heiðurin. Hann lá so høgliga fyri beint niðri í kapellinum. Eg takkaði honum við hondini hvílandi á kistulokið og segði spakuliga, innantanna, við tann deyða, at vit sóust aftur hinumegin. Løtan í kapellinum í dag var enn ein áminning um, at alt byrjar og endar hjá teimum flestu á einum sjúkrahúsi.

Havi nú verið her í eina heila viku, og eri spakuliga vorðin ein partur av sjúkrahúsinum. Tosi samkenslufult og skiljandi við medsjúklingar og starvsfólk í hvítum kitlum um alskyns líðingar, og eri farin at kenna mun á teim ymisku sløgunum av heilivági. Fyri eini viku síðan vóru hesi heiti reint latín í mínum oyrum, so framstig eru gjørd. Áðrenn var eg so lukkiliga óvitandi um heilivág fyri eitt nú ov høgt ella ov lágt blóðtrýst, nú er øðrvísi.

Og hetta blóðtrýstið veitir mær høvuðbríggj, hóast øll hini tosa um tað sum størstu sjálvfylgiligheit. Eg meini so við, tað lægra er for høgt og tað hægra for lágt, og so er knappliga tað lægra lægri og hægra hægri ella øvugt og so fer bara at mala fyri mær, og eg kenni meg sum offur í eini ráðagerð, at forvirra hampafólk.

Og eg komi í tankar um ein eldri mann norðuri í Oyndarfirði, Petur í Mouritsarstovu, sum doyði fyri nøkrum árum síðan. Ongan mann havi eg sæð higartil, sum kundi gera einfaldar hendingar torskiltari enn hann, also væl at merkja áðrenn eg møtti hesum fólkum við skeivum blóðtrýsti ella við áhuga fyri skeivum blóðtrýsti og øllum øðrum í hesum sambandi. Petur setti næstan allar hendingar á landi, í samband nær fólk hann kendi vóru konfirmerað, og so byrjaði svadan: “Hon konfimeraðist um heystið, sum hann konfirmeraðist um várið, sum hin konfirmeraðist várið eftir. Ella var tað nú um heystið, ella várið fyri, nei, tað var heystið eftir o.s.v.”

Og fara vit frá blóðtrýsti og konfirmatiónum, so eri eg eisini farin at drýpa høvur, fullur av forstáilsi, tá tosað verður um opning, gamlamannasjúku, sovi-heilivág og stingir av ymsum slag. Sýni áhuga, og gerist álvarsamur, eins og eg havi roynt tað sjálvur, tá eg hoyri tos um kokuloysn og gangi spentur ein heilan fyrrapart og bíði eftir úrslitinum av eini blóðroynd hjá einum medsjúklingi, sum hvørki hann ella eg skilja rætta týdningin av. Havi næstan hug at hálsfevna ein annan, sum hevur nýtt tímar á vesinum og sum kemur forkroystur út aftur, og fortelir við gleðistárum í eygunum, at nú eydnaðist endiliga honum at fáa okkurt av sær.

Eg ynski einum øðrum sjúklingi, av innasta hjarta, alla hugsandi eydnu, nú hann fyri fyrstu ferð skal til fótarøkt. Hann stendur ferðabúgvin, nýrakaður, kemdur við kremi og bindur lissur. Eg lurti tungur um hjartað eftir einum sjúklingi við blóðtøppi, sum greiðir frá, hvussu hann varð noyddur at gálva og skrykkja frammanfyri fysioterapeutinum, fyri at sannføra hendan um, at hann var okey hóast alt. Knýtið nevan, tá hann greiðir víðari frá eyðmýkingini læknin hevði víst honum, við at flyta ein vanligan kúlupenn frammanfyri eyguni á honum, og spyrja hann, hvat hetta var fyri nakað. “Hatta er væl ein kúlupennur, soleiðis vísir tað seg í mínum eygum, ella?”, hevði sjúklingurin sagt. Men læknin gavst ikki so, hann peikaði á ein knapp í hvíta kitlinum og spurdi sjúklingin, um hann visti hvat hetta var fyri nakað. “Hatta er væl ein knappur, ella heldur tú meg vera pill býttan ella hvat,” hevði sjúklingurin sagt, reyður av illsinni og við innistongdari vreiði.

Blóðsukrið er nú komið niður á tað normala, væl at merkja, tá eg havi tuskað býin upp og niður. Eg havi nú í tríggjar samfullar dagar gingið teinin av landssjúkrahúsinum og heim til býlingin, Inni á Gøtu. Teinurin tekur nú 40 minuttir í skjótari gongd, og skal eg halda heilsuna á hendan hátt, so fer næsta innleggingin at snúgva seg um slitin knø og nýggjar mjadnar, so svár herjar andsperrin í mær í løtuni.

Undarligt lýsi uttanfyri í nátt. Sandurin sæst næstan ikki, men í hylinum omanfyri, beint undir fossinum, skyggir ein reyð gøtulykt av Argjum. Einu løtuna sær út, sum eldur er í hylinum, og næstu løtuna tykist tað, sum hann er fullur av reinasta gulli. Tú kanst síggja ljós í myrkri, leggur tú teg eftir tí.

**Fríggjadagur 18. januar 2002:**
Í dag sleppi eg heim at halda vikuskifti. 8.1 varð longu útskrivaður í gjár. Hann hevur longu sovið eina nátt í Syðrugøtu. 8.2 fór norður til Kvívíkar í dag til hund og vív og nú situr 8.3 einsamallur og ferðabúgvin á sjúkrastovuni, búgvin at fara út í nýkomna fríska landsynningin, ið hevur sovorðnan skund í dag, at hann hevur hug at taka leyst úti á Glyvursnesi.

Hendan dagbók stundar móti endanum. Eg skal inn aftur sunnukvøldið, og um ikki hendir nakað heilt alvorligt mánadagin, so verður ikki meira á hesum sinni. Eg biði lesaran halda mær til góðar, at eg soleiðis havi lagt tykkum inn á Dronning Alexandrines Hospital, ta tíð, ið farin er at lesa hesi dagbókabrot, og leggi aftur at av egnum royndum, at eg eri takksamur fyri heilsuverkið í Føroyum. Úti í heimi er tað bestemt ikki so lætt at vera sjúkur sum í Føroyum, eisini bara tá blóðið er ov søtt, sum í mínum føri. Ella bara, tað veit eg ikki...

Nøkur børn spæla á sandinum og tvey vaksin ansa eftir teimum. Talan er helst um ein útibarnagarð og pedagogar í arbeiði, eftir fúldigu yvirlivilsisdraktunum hjá teim vaksnu at døma. Hesar sterkt littu yvirlivilsisdraktir, ið tola arktiskan kulda, hava sogið alla kvinnuliguheit úr pedagogunum og tær ganga sum stívir kynsleysir robottar, meðan sandurin gevur seg undir teimum og aldurnar vaska frísku fótafetini. Børnini hugna sær, og lívið heldur fram, meðan aldubrotini sláa taktina seigan.

**Mánadagur 21. januar 2002:**
Í gjarkvøldið kom eg aftur á B6 aftan á vikuskiftið heima. Stovufelagarnir, sum eg hevði verið saman við í seinastu viku, vóru burtur, og nú var komin nýggjur maður, hann var úr Æðuvík í Eysturoy. Vistu av hvørjum øðrum, men heldur ikki meira enn tað.

Hann svav tungan, tá eg kom inn stovuna. Nýggj ljóð, nýggjar rørslur og antikvariska hospitalssongin undir honum gav seg øðrvísi enn hjá tí undanfarna, sum nú er heima í Gøtu. Nýggi maðurin var munandi førligari enn undanfarni, og tað fekk troytta jarnið í songini at sanna hesa nátt.

Hann ressaðist av óljóðinum, tá eg fór at gera til at leggja meg og vit fóru at práta. Dámligur maður og harðmæltur. Hann kundi tosa við í nógvum. Hann visti hvør eg var, og hann spardi seg ikki, nú hann, í einrúmi, hevði ein journalist, uttanfyri tænastu, upp á tvey manns hond. Hann spurdi meg um øll viðurskifti innan fjølmiðlar og meira afturat. Eg svaraði eftir førimuni, men stóð fastur fleiri ferðir, meðan spurningarnir regnaðu niður yvir meg. Hann vildi hava at vita um sannleikan í lesarabrøvum, um huldumenn í lesarabrøvum høvdu rætt til at sverta onnur út, og so kom hann við fleiri dømum. Eg gjørdist eitt sindur foyur, tí hesin maðurin las bløðini nógv neyvari enn eg sjálvur, og so hevði hann eitt fotografiskt minni eisini.

Honum dámdi ikki dulnevnd lesarabrøv og eg mátti geva honum rætt. Skilji heldur ikki sjálvur, at fólk skulu kenna trongd at fjala seg aftan fyri dulnevni í einum demokratiskum samfelag, sum hevur skrivi- og talufrælsi felt í sjálva grundlógina. Kenni tað eisini sum eina háðan móti øllum teimum, sum

*Framhald á næstu síðu*



*Greinahøvundurin liggur her forkelaður í allar endar og kantar á B6*